# Ársfrágreiðing 2020




BÝAR
BÓKA
SAVNIÐ

**Býarbókasavnið**
Niels Finsens gøta 7
100 Tórshavn
Tel. 302030
bbs@bbs.fo
www.bbs.fo

BÝAR
BÓKA
SAVNIÐ

# Ársfrágreiðing 2020


Árið, ið fór ....................................................... 4
  Bókasavnið er stongt, ....................................................... 4
  men e-bókasavnið er opið ....................................................... 4
  Ungdómsdeild ....................................................... 5
  Miðlan av bókasavnstilfari ....................................................... 5
Um Býarbókasavnið ....................................................... 6
  Upplatingartíðir ....................................................... 6
  Missión ....................................................... 7
  Visión ....................................................... 7
  Søga ....................................................... 8
Virksemi ....................................................... 9
  Útlán ....................................................... 9
  Nevndir ....................................................... 9
  Tænastur ....................................................... 10
  Nettænastur ....................................................... 11
Tiltøk í 2020 ....................................................... 12
  Onnur átøk ....................................................... 19
Størv ....................................................... 23
Hini bókasøvnini í kommununi ....................................................... 23

# Árið, ið fór

## Bókasavnið er stongt,

## men e-bókasavnið er opið




Sum hjá so mongum øðrum stovnum og fyritøkum var 2020 eitt heldur óvanligt ár. Tað var sjálvsagt heimsumfatandi krúnufarsóttin, sum avmarkaði vanliga bókasavnsvirksemið í býnum, og tað merkti, at bókasavnið stóran part av árinum hevði munandi skerdar upplatingartíðir ella var púra stongt fyri tænastu á staðnum og við strongum avmarkingum í bæði handfaring av bókum og tali av brúkarum, sum høvdu loyvi at vera inni. Sprittdunkar, handskar, maskur, skermar og frámerkir um at halda fráststøðu vóru á øllum hæddum. Bøkur, sum vórðu bornar aftur, fóru í sóttarhald, og fundarvirksemið gekk í nógv størri mun fyri seg um telduskíggjan. Eisini vóru nógvar avlýsingar av tiltøkum.



*Ein av lesiringunum hittist á Zoom*

Tíbetur vóru vit í tí hepnu støðu, at bókasavnið longu hevði sera góðar nettænastur at veita teimum bókasavnshungrandi, nú møguleikarnir at koma á bókasavnið vóru so skerdir. Hetta merkti, at talið á útlæntum netbókum og serliga ljóðbókum, sum bókasavnið lænir út umvegis donsku bókasavnskipanina eReolen, hækkaði munandi hesa tíðina.

.

Út á heystið fóru brúkararnir aftur at fjølgast. Barnagarðar, skúlaflokkar, næmingar, lesandi og onnur fóru aftur at brúka bókasavnið. Spælistovan, sum er ætlað foreldrum við børnum, sum ikki eru á stovni, læt upp aftur. Matpakkarúmið læt eisini upp aftur, og ásetingin um mest loyvda tal av fólki inni varð linkað og seinni slept.

Tiltøk vóru aftur á skránni. Lesiringarnir byrjaðu aftur í oktober, og í desember skipaði bókasavnið fyri eini upplestrarrøð, har dugnaligir upplesarar komu á bókasavnið at lesa upp jólasøgur.

Sum heild hevur farsóttin eisini havt við sær, at starvsfólk hava noyðst at verið fleksibul, og netfundir og heimaarbeiði hava fylt meir enn vanligt.

# Ungdómsdeild




*Verandi umstøður hjá ungdóminum á Býarbókasavninum*

Leingi hevur verið tørvur á, at ungdómurin fær meiri pláss og betri umstøður á Býarbókasavninum. Tórshavnar býráð játtaði í apríl 2020 eina upphædd at skapa spennandi karmar um eina nýggja ungdómsdeild á Býarbókasavninum. Ætlanin er at skapa eitt spennandi stað, sum bara er til tey ungu, sum hava verið fyri vanbýti á Býarbókasavninum. Í 2020 varð farið undir verkætlanina, og væntandi verður arbeiðið liðugt í 2021.

Á ungdómsdeildini skulu tey ungu fáa betri og meiri hóskandi pláss at vera bókasavnsbrúkarar. Ungdómsdeildin skal vera eitt innbjóðandi stað, sum gevur teimum ungu íblástur, møguleika og umstøður at vera á bókasavninum. Á ungdómsbókasavninum verður, umframt eitt gott úrval av ungdómsbókum á bæði føroyskum, donskum og enskum, eisini rúm fyri borðspølum, lesikrókum og annars lestrarumstøður.

# Miðlan av bókasavnstilfari









Í 2020 setti bókasavnið sær fyri at gerast enn meiri sjónligt á teimum sosialu miðlunum, og eisini varð enn meiri dentur lagdur á at miðla fysisku bókina í bókasavnsrúminum. Hetta hevur hepnast væl, og er ein haldgóð miðlaætlan er løgd.
Nógvar og skiftandi framsýningar hava verið í húsinum, m.a. altjóða holocaustdagur, kvinnudagur, sámiskur tjóðardagur og ymiskar aðrar temaframsýningar.
Framsýningar eru fleiri staðni í húsinum, og bøkurnar fingu í 2020 størri rúmd enn áður á 1. hædd, so at lánarar, sum koma inn, beinanvegin síggja okkurt av tí spennandi og fjølbroytta tilfari, sum bókasavnið hevur til útláns.

Vegna koronu hevur ikki borið til at havt so nógv tiltøk, men nøkur tiltøk hava kortini verið, og lesiringarnir hava hitst talgilt.

# Um Býarbókasavnið

## Upplatingartíðir

| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | 9.00 – 20.00 |
| Fríggjadag | 9.00 – 18.00 |
| Leygardag | 10.00 – 17.00 |
| Sunnudag | 14.00 – 17.00 |

**Býarbókasavnið umfatar pr. 31. desember 2020:**

- Býarbókasavnið í Havn
- Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn
- 9 skúlabókasøvn í Tórshavnar kommunu

Á Býarbókasavninum eru tríggjar deildir:

- Útlán til vaksin og ung
- Barnabókasavn
- Blaðkafé og avgreiðsla

Til tess at tryggja borgarunum eina góða tænastu hevur Býarbókasavnið eina missión og eina visión at halda seg til:

# Missión

Býarbókasavnið fremur upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi í Tórshavnar kommunu og í Føroyum annars.

# Visión

Býarbókasavnið skal tryggja øllum borgarum í kommununi og borgarum aðrastaðni frá góða og sjónliga atgongd til upplýsing, lærdóm og mentanartilboð og geva hvørjum borgara sær, uttan mun til aldur, kyn, heilsustøðu ella samfelagsliga støðu annars møguleika fyri djúphugsan og menning av egnum evnum og førleikum.

Til at røkka endamálinum skal Býarbókasavnið hava til taks bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur og annað hóskandi tilfar, sum verður lænt út uttan viðurgjald, og sum umboðar dygd og fjølbroytni og er aktuelt. Neyðugt er eisini at hava starvsfólk, sum eru útbúgvin til at savna, skipa, meta um og miðla tilfarið og kunnu geva brúkarum holla vegleiðing í øllum viðurskiftum á bókasavninum. Eisini skal Býarbókasavnið bjóða umstøður, umhvørvi og kunning, sum vekir forvitni og áhuga fyri luttøku í samfelagi og mentanarlívi.

Sum arbeiðspláss skal Býarbókasavnið vera eitt stað, har starvsfólkini sleppa at royna seg yrkisliga og persónliga, og har tey verða vird og sædd bæði sum menniskju og sum fakfólk.

# Søga

| | |
|---|---|
| 1969 | Tórshavnar kommuna setti Býarbókasavnið á stovn 1. apríl. Tað helt til í leigaðum hølum í Niels Finsens gøtu 7. Støddin var 514 fermetrar |
| 1977 | Bókasavnið fór at læna út ljóðbøkur |
| 1990 | Bókasavnið leigaði eina hálva hædd afturat |
| 1993 | Hølini vórðu aftur víðkað, og bókasavnið var nú 813 fermetrar í 4 hæddum |
| 1998 | Alt tilfarið varð skrásett á teldu |
| 2004 | Bókasavnið fór at læna út dvd-filmar |
| 2005 | Nýggj telduskipan varð keypt |
| 2006 | Bókasavnið fekk lyftu |
| 2009 | Kommunan keypti tann partin av bygninginum, sum áður varð leigaður |
| 2010 | Farið varð undir umbygging av hæddini út til Niels Finsens gøtu |
| 2011 | Gøtuhæddin varð tikin í nýtslu í apríl sum partur av Býarbókasavninum |
| 2011 | Sjálvgreiðslur til útlán og innlating av bókum vórðu tiknar í nýtslu í mai |
| 2017 | Opin goymsla læt upp í kjallaranum |
| 2018 | Leikasavnið læt upp |
| 2018 | Matpakka- og framførslurúm læt upp |
| 2018 | Í september varð nýggja bókasavnsskipanin Cicero tikin í nýtslu |
| 2019 | Spælistovan flutti inn<br>Býarbókasavnið yvirtók hølini á veghæddini, har kaféin áður var<br>Býarbókasavnið fekk skrivstovu- og fundarhøli á 4. hædd |

# Virksemi

## Útlán

| | |
|---|---|
| Samlað útlán | 57.397 |
| e-bøkur og e-ljóðbøkur | 10.668 |
| leikur (Leikasavnið) | 530 |

| | |
|---|---|
| Lánarar | 9.397 |
| Tilfar | 76.069 |
| Vitjandi | 93.000 |




## Nevndir

Býarbókasavnið hevur umboð í hesum nevndum:

Mentanarvirðisløn M. A. Jacobsens
Býarbókavørðurin er fastur skrivari í nevndini

Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs
Barnabókavørður er skrivari í nevndini

Ráðgevandi nevnd hjá Ljóðbókatænastuni
Bókavørður er limur í nevndini

# Tænastur

Býarbókasavnið hevur samstarv um útlán við hesar stovnar í kommununi: Barnatannrøktina, Boðanesheimið, Eldrasambýlið oman Mattalág, Ellisheimið, Heimið við Vallalíð, Lágargarð, Psykiatriska Depilin, Tjarnargarð og Varðhaldið. Umleið tvær ferðir árliga vitja fólk frá Býarbókasavninum hesar stovnar, undantikið Varðhaldið, har vitjað verður hvønn mánað.

## Bókaberin

Bókasavnið hevur tænastuna *Bókaberin*, tað eru starvsfólk, ið koyra út við bókum, ljóðbókum og tíðarritum. Rørslutarnað og onnur, ið ikki fáa komið á bókasavnið, kunnu melda seg til skipanina. Les meira um tænastuna á https://www.bbs.fo.

## Leikasavnið

Føroya fyrsta almenna leikasavn læt upp á Býarbókasavninum 15. juni 2018.
Á Leikasavninum ber til at læna dygdargóðar leikur við líknandi treytum, sum tá tú lænir eina bók.

Leikasavnið er partur av Grøna leiðin-átakinum, sum er sett í verk sambært umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu, har greið mál eru sett um økta býtisnýtslu.

## Spælistovan

Á spælistovuni hittast foreldur við børnum, sum ikki ganga á stovni. Í 2020 var Spælistovan opin tveir dagar um vikuna, hvønn týs- og hósdag kl. 10-13.
Spælistovan er á 3. hædd, har barnabókasavnið eisini er. Í spælistovuni eru leikur, pútur og madrassur, so góðar umstøður eru hjá børnunum at spæla.
Øll børn eru vælkomin saman við foreldrunum.

## Lestrarhøli

Ert tú lesandi, og hevur tú tørv á at lesa og skriva í friði og náðum í jóla- ella summarfrítíðini, bjóðar Býarbókasavnið lestrarhøli hesi tíðarskeið á ovastu hædd á Býarbókasavninum.

Her kanst tú sita í friðarligum umhvørvi og arbeiða við uppgávum og lestri. Øll, sum eru undir hægri lestri, bæði útisetar og lesandi í Føroyum, eru vælkomin at nýta hølini.

## Matpakkarúm

Eftir at vitjandi leingi høvdu spurt eftir einum matpakkarúmi til børnini, læt Býarbókasavnið í november 2018 upp eitt spildurnýtt rúm, har børn kunnu eta sínar matpakkar

Atgongd er til matpakkarúmið frá barnabókasavninum á 3. hædd. Pláss er fyri umleið 10 børnum umframt starvsfólki, og brúkararnir taka sjálvir upp eftir sær. Vask, lappar, feiiskuffa og ruskspannir eru á staðnum.

*

Ókeypis atgongd er til internetið á øllum hæddum á bókasavninum. Eisini er atgongd til teldur, skannara, printarar, kopimaskinu, fax, innbinding við spiralryggi og lamineringsmaskinu.

Býarbókasavnið hevur sjálvgreiðslu, har lánarar kunnu avgreiða síni lán sjálvir.

Frá ársbyrjan í 2015 víðkaði Býarbókasavnið munandi um upplatingartíðirnar, soleiðis at tað eisini bleiv opið um kvøldið og báðar dagarnar í vikuskiftinum. Hetta hevur havt við sær ein støðugan vøkstur í talinum av vitjandi á Býarbókasavninum.

# Nettænastur

Býarbókasavnið hevur heimasíðu, umframt síður á Facebook og á Instagram, har meira kunning fæst um bókasavnið.

Á heimasíðuni kann lánarin leita í bókaskránni hjá Býarbókasavninum, bíleggja tilfar, gera persónligar bókalistar og endurnýggja lán. Har eru eisini tíðindi frá bókasavninum, kalendari við komandi tiltøkum, leinki til e-bøkur og annað nettilfar, sum Býarbókasavnið bjóðar lánarum sínum, og vegleiðingar um, hvussu ein brúkar tær.

Á facebooksíðuni verður kunnað um tiltøk, bæði komandi og farin, og nógvar myndir eru at finna á bæði facebooksíðuni og á instagramsíðuni hjá Býarbókasavninum.

Til ber eisini at samskifta við bókasavnið umvegis boðtænastur á bæði heimasíðuni og á facebooksíðuni.

# Tiltøk í 2020

**16.- 22. januar**

## Søla av brúktum bókasavnstilfari

Fyri at rúma nýggjum, fjølbroyttum og tíðarhóskandi tilfari má Býarbókasavnið regluliga burturbeina bókasavntilfar, antin tí at tað er óaktuelt, ikki verður lænt longur ella tí at tilfarið er ov illa farið.

Í døgunum 16.-22. januar 2020 var søla av brúktum bókum, tíðarritum, tónleiki og øðrum tilfari eftir hollendskari fyrimynd - prísurin lækkaði hvønn dag. Byrjað varð hósdag, tá prísurin var 20 krónur, fríggjadag 15 krónur, leygardag 10 krónur, sunnudag 5 krónur, mánadag 10 krónur fyri ein fullan posa, týsdag og mikudag var alt ókeypis.

Sølan av brúktum bókasavnstilfari fer vanliga fram fýra ferðir um árið. Um veturin, várið, summarið og um heystið.

**21. jan - 20. apríl**

## Framsýning í sambandi við, at 120 ár eru liðin, síðan William Heinesen varð borin í heim



Tann 15. januar 2020 vóru 120 ár síðan, at William Heinesen varð føddur, og í hesum sambandi hevði Býarbókasavnið eina framsýning av plakatum og prentum av nøkrum av hansara listaverkum. Á framsýningini vóru eisini bøkur eftir og um William Heinesen umframt dømi um plátuhúsar og bókapermur, sum hann hevði gjørt.

## 31. januar — Vetrarljós 2020




Vokalkvintettin KATA sang á Býarbókasavninum í sambandi við Vetrarljós 2020, sum er kvøldið, tá vit fagna, at myrka tíðin fer aftur um bak, og gingið verður ímóti ljósari tíðum. Kvinnurnar í KATA sungu bulgarskan kvinnukórsang og nýggjar útsetingar av føroyskum kvæðum og skjaldrum, og nógv fólk var og lurtaði.

## 19.-24. februar — Føstulávintsklipp á barnabókasavninum



Á barnabókasavninum var høvi at gera grýluskortar. Kartong, lím, skabelónir og annað tilfar var lagt fram til øll, sum høvdu hug at vera við. Hetta er eitt ókeypis afturvendandi tiltak, sum barnabókasavnið hevur staðið fyri í mong ár.

## 5. juli - Borðspælskvøld



Áhugafelagsskapurin Tabletop Føroyar fór í samstarvi við Býarbókasavnið at skipa fyri borðspælskvøldum í juli 2020. Tiltøkini vóru ókeypis og skipað soleiðis, at øll kundu møta upp og luttaka í teimum spølum, sum vóru til taks, ella kundi taka sítt egna spæl við. Býarbókasavnið eigur fleiri borðspøl og spennandi spælibøkur, sum eisini vóru til taks og til útláns. Tiltakið fekk sera góða undirtøku.

## 22. september Spælistovan læt upp aftur



Spælistovan fyri børn saman við foreldrum, sum vanliga er opin týsmorgun og hósmorgun kl. 10-13, hevði vegna koronu verið stongd, so tað var gleðiligt, tá spælistovan umsíðir kundi lata upp aftur.

**3. - 6. oktober** **Umhvørvisvikan 2020**

Umhvørvisvikan 2020 varpaði ljós á lívmargfeldi.
Árliga Umhvørvisvikan hjá Tórshavnar kommunu plagar at vera um várið, men í 2020 var Umhvørvisvikan útsett til oktober.
Í 2020 varð varpað ljós á lívmargfeldi, sum fevnir um alt tað livandi fjølbroytnið í náttúruni. Bókasavnið luttók við at gera fleiri framsýningar um evnið, umframt at skipa fyri einum barnatiltaki um at savna bløð.

**4. oktober** **Barnatiltak - Út at savna bløð!**




Í sambandi við Umhvørvisvikuna 2020 var tiltak fyri børn um at pressa bløð.
Tilfar til at gera eina einfalda blað-/blómupressu úr endurnýtslupappi og -pappíri var til taks á bókasavninum, síðani varð farið út í náttúruna at samla bløð at pressa.

**7. -13. oktober** **Søla av brúktum bókasavnstilfari**



Heystsølan av burturbeindum bókasavnstilfari byrjaði hósdagin 8. oktober og var eftir hollendskari fyrimynd – prísurin lækkar hvønn dag.

## 2. november — Lesiringarnir byrja aftur

Lesiringarnir á Býarbókasavninum byrjaðu aftur mánakvøldið 2. november. Lesiringarnir hava verið virknir á Býarbókasavninum síðani á heysti 2013. Luttakararnir hittast vanliga fyrsta mánakvøld í hvørjum mánaði fyri at tosa um eina ávísa bók, sum øll hava lisið.

## 18. november — Skrivikafé – Amnesty International

Ung í Amnesty høvdu skrivikafé á Býarbókasavninum.

## 26. november — Upplestur á YouTube



Mariann lesur upp úr bókini "Øll telja við"

Mariann Hansen las upp úr myndabókini "Øll telja við" eftir Kristin Roskifte. Rógvi Rasmussen filmaði.
Bókin er full av ymiskum fólki, og lesarin kann telja tey, fylgja teimum, dáma tey og leggja til merkis, hvussu søgur teirra flættast saman. Tað eru fleiri smá og stór loyndarmál at avdúka hjá einum, sum er forvitin og hevur gløgg eygu. Og kanska lesarin finnur seg sjálva/n.

## 27. november — Jólaklipp á barnabókasavninum

Høvi var at koma inn á barnabókasavnið og gera jólaprýði at heingja upp heima ella á barnabókasavninum.
Tiltakið byrjaði leygardagin 28. november og endaði jólaaftan.

## 5.-23. desember Søguløtur fyri vaksin og børn



Býarbókasavnið vildi geva fólki ein skáa frá jólaresinum og skipaði fyri søguløtum fyri vaksin og børn.
Dugnaligir upplesarar lósu jólasøgur í hugnaligum umhvørvi, á 1. hædd fyri vaksnum og á barnabókasavninum fyri børnum.
Bókasavnið bjóðaði gløgg og okkurt gott afturvið.

Hesi lósu upp til søguløtur fyri vaksin:
Leygardagin 5/12 kl. 14 - Oddfríður Marni Rasmussen
Leygardagin 12/12 kl. 14 - Laura Joensen
Leygardagin 19/12 kl. 14 - Marjun Syderbø Kjelnæs
Mikudagin 23/12 kl. 17 - Theodor Eli Dam Olsen

Søguløtur fyri børnum:
Leygardagin 5. desember kl. 14
Leygardagin 12. desember kl. 14
Leygardagin 19. desember kl. 14
Mikudagin 23. desember kl. 17
Mariann Hansen las.

## 15. desember Lestrarhøli á Býarbókasavninum



Býarbókasavnið bjóðaði lesandi lestrarhøli í desember mánaði og inn í januar. Her sótu lesandi í friðarligum umhvørvi og arbeiddu við uppgávum og lestri. Øll, sum vóru undir hægri lesnaði, bæði útisetar og lesandi í Føroyum, vóru vælkomin at nýta hølini.

# Onnur átøk

## Læn ein elorkumátara




Í umhvørvispolitikkinum “Grøna leiðin” hjá Tórshavnar kommunu er mál sett um at skapa tilvitan um orkunýtslu og orkusparing. Í hesum sambandi fór Býarbókasavnið at læna út elorkumátarar.

Ein elorkumátari er serliga týðandi fyri húsarhald, ið nýta meira streym enn miðal, ella har elrokningin er hægri enn væntað. Ein elorkumátari er harumframt væl egnaður í sambandi við undirvísing í skúlanum.
Um elorkunýtslan – uttan elbil og hitapumpu – er størri enn 2.000 kr (1.000 kWh) um árið fyri hvønn persón í húsarhaldinum, eru helst pengar at spara. Hetta krevur tó vitan um, hvar óneyðuga elorkunýtslan er, og tað kann ein elorkumátari vísa. Elorkumátarin vísir m.a., hvussu nógv eitt tól nýtir í krónum og kilowatttímum, og hvussu stórt CO2-útlátið er.
Ætlanin er, at hetta átakið er eitt fet fram ímóti at røkka tí málinum.
Harafturat stuðlar átakið upp undir økta býtisnýtslu; tað merkir, at tað er óneyðugt hjá hvørjum húsarhaldi at eiga sín egna elmátara. Tað minkar um framleiðslu og nýtslu av rávørum.

## Álit um dagføring av bókasavnslógini



Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum, setti í mars 2020 ein arbeiðsbólk at skriva álit um dagføring av bókasavnslógini. 21. september varð álitið handað landstýrismanninum. Býarbókavørðurin Vónbjørt Vang var partur av arbeiðsbólkinum, ið skrivaði álitið.

Í tíðindaskrivi frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum 23. september stendur:
Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum, fekk í gjár 21. september 2020 handað álit um dagføring av bókasavnslógini. Verandi bókasavnslóg er frá 2001, og við teimum stóru broytingum, ið eru farnar fram í samfelagnum síðan aldarskiftið, so er tørvur á umfatandi broytingum í bókasavnslóggávuni.

Tilmælini í álitinum taka støði í, at bókasøvnini fremja upplýsing, útbúgving og mentanarligt virksemi, og at bókasøvnini hava ein týðandi mentanarligan, útbúgvingarligan, búskaparligan og sosialan týdning.
Á útbúgvingarliga økinum er stór menning farin fram. Fróðskaparsetur Føroya hevur seinastu árini ment seg til at vera fremsta val hjá føroyskum ungdómi í lestrarhøpi. Hetta setur stór krøv til bókasavnstænasturnar hjá landinum, og ynski hava í fleiri ár verið sett fram um at fáa skipað eitt universitetsbókasavn.
Talgildar tænastur eru vorðnar ein alt størri partur av virkseminum hjá bókasøvnunum, og tørvur er tí á eini bókasavnslóg, sum í størri mun tekur støði í fortreytunum í okkara talgildu øld, og er lagað til tær talgildu tænasturnar.
Í álitinum eru eisini tilmæli um útveiting av bókasavnstænastunum til fólkabókasøvn og skúlabókasøvn, um áseting av minstamarki fyri útgjaldi av bókasavnsgjaldinum til rithøvundar, um stovnan av bókasavnsráði og um lánisamstarv millum bókasøvn.
Tað hevur leingi verið ført fram, at skipanirnar við stuðli frá landinum til kommunurnar í bókasavnslógini ikki virka nóg væl, tí upphæddirnar, ið hava verið settar av á fíggjarlógini til endamálið, ikki hava fylgt við menningini á økinum. Í álitinum verður mælt til, at stuðulsskipanirnar verða tiknar av, og at land og kommunur samráðast um nýggja skipan á økinum.
"Við hesum áliti havi eg fingið eitt gott grundarlag fyri at arbeiða víðari við einum lógaruppskoti um dagføring av bókasavnslógini, og farið verður undir hetta arbeiðið beinanvegin," sigur Jenis av Rana, landsstýrismaður.
Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum setti í mars 2020 ein arbeiðsbólk at skriva álit um dagføring av bókasavnslógini. Í arbeiðsbólkinum sótu:
Annika Smith, landsbókavørður
Arnbjørn Ó. Dalsgarð, bókasavnsráðgevi, skrivari
Vónbjørt Vang, býarbókavørður og næstforkvinna í Rithøvundafelagnum
Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri á Fróðskaparsetri Føroya
Eyðun Christiansen, stjóri í Kommunufelagnum
Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Armgarð Weihe, fulltrúi í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, forkvinna
Álitið kann lesast í fullari longd á heimasíðuni hjá Uttanríksi og mentamálaráðnum:
https://www.ummr.fo/fo/kunning/alit/

## 90-ára starvsdagur



Týsmorgunin 6. oktober var 90 ára starvsdagur á Býarbókasavninum. Trý starvsfólk høvdu arbeitt á stovninum í ávikavist 45, 35 og 10 ár. Johanna Cathrina Mørkøre, bókavørður, hevði starvast á Býarbókasavninum í 45 ár, Malan Hilmarsdóttir hevði verið barnabókavørður á Býarbókasavninum í 35 ár, og Gunnvá Vang hevði arbeitt sum skrivstovufólk á Býarbókasavninum í 10 ár.
Dagurin varð hátíðarhildin á Býarbókasavninum saman við starvsfeløgum.

## Bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens 2020



Mentanarheiðurslønir Tórshavnar býráðs 2020 vórðu latnar í Müllers pakkhúsi 8. oktober, 2020

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir fekk Lív Maria Róadóttir Jæger. Jógvan D. Hansen varð heiðraður fyri mentanaravrik. Hjalmar P. Petersen varð heiðraður fyri yrkisbókmentir. Tvær barnamentanarheiðurslønir vórðu latnar, onnur til Marjuna Syderbø Kjelnæs og hin til Rakel Helmsdal.

## Læn eitt borðtennisbatt



Í oktober 2020 varð farið undir at læna út borðtennisbatt og -bóltar á Býarbókasavninum í sambandi við, at Tórshavnar kommuna hevði sett tvey borðtennisborð upp í garðinum uttan fyri Betri Banka í miðbýnum. Øll, sum hava hug at fáa hitan og royna seg eina løtu, kunnu læna borðtennisbatt og -bóltar inni á býarbókasavninum.

## Dimmalætting


Lestrarhølið á Býarbókasavninum

ØLL TELJA VIÐ

Upplestur á netinum

Á Býarbókasavninum kanst tú fáa tær ein skáa frá jólaresinum

Býarbókasavnið fór í 2020 undir eitt samstarv við Dimmalætting um eina ferð um mánaðin at hava eina opnu við bókasavnstíðindum. Har verður kunnað um ymiskt, sum fer fram á Býarbókasavninum, og bókavørðir viðmæla góðar bøkur til vaksin, ung og børn.

# Størv

Á Býarbókasavninum eru tilsamans 11,5 ársverk.

### Størv, ið eru ásett

Býarbókavørðurin er leiðari, 1. bókavørður er varaleiðari, 4 bókavørðir arbeiða fulla tíð, 2 bókavørðir ¾ tíð.

Skrivstovu- og avgreiðslufólk: 4 fulltíðarstørv eru ásett, og 6 starvsfólk arbeiða í hesum størvum.

Aftur at hesum eru eisini tímaløntir bókauppsetarar og feriuavloysarar.

Eisini er ein skúlabókavørður í starvi 2 tímar um vikuna á Kollafjarðar bókasavni.

### Førleikamenning

Vegna koronu vóru øll ásett skeið avlýst ella útsett.

# Hini bókasøvnini í kommununi

Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn
Telefon (skúlin) 421475.

Bygdar- og skúlabókasavnið er í skúlanum. Opið er fyri børn og vaksin í vetrarhálvuni (1. oktober til 31. mars) mikukvøld kl. 19-21 og í summarhálvuni (1. apríl til 30. september) mikukvøld kl. 19-20. Stongt er í summarfrítíðini hjá skúlanum.

### Skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu

| | |
|---|---|
| Útlán skúlar 2019: | 54.734 |
| Tilfar í alt skúlar: | 217.226 |

